# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Javnstøða og javnrættindi

Sunnudagin tann áttanda mars er árligi kvinnudagurin, har spurningar um javnstøðu, javnrættindi og spurningar sum heild viðkomandi rættindum hjá kvinnum verða umrøddir. Tað er ikki meira enn gott eitt hundrað ár síðan, føroyskar kvinnur fingu kommunalan valrætt og ikki hundrað ár síðan kvinnurnar fingu valrætt til løggávutingini í ríkinum. Hóast framstig av løgfrøðiligum og sosialum slag eru hend, so er enn lang á mál í spurninginum um javnrættindi fyri kvinnu innan- sum uttanlands.

Hesin spurningur er heldur ikki so heilt einfaldur at greiða, tí krøvini til javnrættindi broytast støðugt. Hesi krøv broytast alt eftir mentanarligum rákum í samfelagnum. Tað er í hesum høpi ein sera áhugaverdur spurningur, hvørjar kreftir í samfelagnum ávirka hesi skiftandi rák og hvør, tað er, sum í síðstu atløgu ger av, hvørji evni og hvørjir spurningar, ið eru mest átrokandi og aktuellir í dagsins samfelag. Hóast spurningurin um javnstøðu sostatt ikki er so einfaldur, sum ein uttan víðari skuldi hildið, so kann staðfestast, at javnstøðuspurningurin fevnir um nakrar grundleggjandi meginreglur í samfelagnum. Her er við øðrum orðum talan um nøkur viðurskifti, ið hóast skiftandi rák og átrokandi dagsaktuell evni, skulu vera í lagi fyri, at vit kunnu staðfesta, at javnstøða og javnrættindini eru galdandi í samfelagnum.

Her er við øðrum orðum talan um narkar fortreytir, ið eiga at vera galdandi í einumhvørjum fólkaræðiligum samfelag. Vit hugsa her fyrst og fremst um javnstøðu í tí vit kunnu kalla almenna politiska rúminum, har tær stóru avgerðirnar verða tiknar. Hóast kvinnur við atliti at politisku skipanini hava somu formligu rættindi sum menn og hóast stór framstig á økinum, er enn langt á mál. Tey flestu munnu í dag vera samd um, at eitt idealið má vera, at tað til einaoghvørja tíð eru eins nógvar kvinnur og menn á tingi, í landsstýri og í bý- og bygdaráðum. Seinastu valini hava flutt mørk og at gongdin er jalig, um vit meta um kynsbýtið í okkara fólkavaldu stovnum. Tað ræður tí um hjá politisku flokkunum at halda fast við hesa jaligu gongd. Tey, sum kunnu gera nakað munandi við henda spurning, eru grasrøturnar í politisku flokkunum, sum kunnu útinna nógv vald innanflokka. Ein týðandi leið at ganga er at gera tað innanflokka lobbyarbeiði, ið kann tryggja javnstøðu í uppstilling.

Annar stórur spurningur snýr seg um formliga og óformliga javnstøðu á arbeiðsmarknaðinum og í privatlívinum. Her liggja stórar uppgávur fyri framman hjá javnstøðunevnd, kvinnufelagsskapum, fakfeløgum og ikki minst hjá tí einstaka borgaranum. Jú ásannast má, at tað framvegis eru allar góðar grundir at halda kvinnudag tann 8. mars og at fara til frálíka tiltakið hja Kvinnufelagnum í Havn og Kvinnusamskipan Føroya. Umframt mongu fundirnar kring landið. Vit loyva okkum eisini at minna í tiltakið leygarkvøldið kl. 20 á Hvonn, ið ikki verður minni áhugavert. Við ynskinum um ein altjóða kvinnudag til gleði og gangs fyri kvinnur og menn úti og heima.

**Sosialurin**

## 30.000 tons av hvítingsbróður

SIGURÐ S. SIMONSEN
Borgarstjóri



Hugaligt at lesa, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, aftan á fyrispurning frá Sjálvsstýrisflokkinum við Kristinu T. Larsen, helt tað vera skilagott at lata einum ídnaðarbáti royndarloyvi til at fiska hvítingsbróður.

Sjálvur var eg við í fiskiskapinum eftir hvítingsbróður síðst í 70- árunum og fyrst í 80-árunum. Tá var ongin trupulleiki við íblanding av hýsuyngli av tí einføldu orsøk, at fiskiskapurin eftir hvítingsbróður gekk fyri seg uttari og á djúpari vatni (størri dýpi) enn tað, sum hýsuynglið vanliga uppiheldur seg, tá ið tað tekur botn.

Í dag skuldi so ongin trupulleiki verið yvirhøvur, nú skiljiristirnar eru so framkomnar. Hetta man eisini vera einasti fiskastovnur yvirhøvur í norðurhøvum, sum fiskifrøðingar mæla til, ella ikki mæla frá, at fiska ein ávísa nøgd av, men sum myndugleikarnir kortini ikki loyva.

Nú sigur onkur, jú, men tekur man so ikki føðina frá onkrum øðrum? Jú, so er, teir størru fiskarnir eta teir smáu, hetta er náttúrulógin. Men hesi 30.000 tonsini av hvítingsbróður skulu so eisini hava at eta hvønn dag, og allarhelst eta teir burturav onkrum, ið annar fiskur, eitt nú toskur og hýsa annars skuldu etið, so man tað ikki vera ein spurningur um javnvág millum fiskasløgini, ið vit skulu raka fyri at fáa sum mest burturúr einari burðardyggari heildarveiðu.

Hvat virði hevur so nevnda fiskanøgd fyri Føroyar? Um alt mjølið og lýsið, ið fekst burturúr hvítingsbróðrinum varð gjørt til laksafóður og bleiv brúkt í føroysku alivinnuni, hevði útflutningsvirðið verið áleið kr. 150 mió. Umframt at hava stóran týdning fyri Føroyar, kundi hetta verið eitt plástur á sárið, nú so lítið bleiv í okkara part av svartkjaftinum.

## Kvinnutreff í Badmintonhøllini

*Tíðindaskriv*

Aftur í ár skipa kvinnur í Betesda fyri stórum kvinnumøti í Badmintonhøllini leygarkvøldið 7. mars kl 20.

Í fjør eydnaðist tiltakið sera væl. Kvinnurnar møttu fjølmentar, bæði úr bygd og bý úr øllum samkomum, meira enn 400 kvinnur.

Kvinnur luttaka við sangi og talu. Eisini koma trúboðanarkvinnur at hava orðið.

Kaffi verður at fáa, og dentur verður lagdur á at góð tíð er til hugnaligu samveruna.

Sunnukvøldið 8. mars verður evangeliskt møti í Badmintonhøllini kl. 18.

Hetta møtið verður serstakt við tað at kvinnur skipa fyri og lutaka við vitnisburðum og sangi.

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.